## VIÐMERKINGAR

# Nú má verða nokk

**Niels Peter Bech**
*formaður í Hondbóltsfelagnum Tjaldur og Starvsnevndarlimur í HSF*

Fyri fyrst at koma til hví Tjaldur spælur í SunSet-kappingin (fyrr 1. deild)?

Soleiðis sum tað hevur verið nógv tey síðstu árini, hevur nr. 1 ella 2 kunna flutt beinleiðis upp úr 2. deild, meðan nr. 3 hevður skula spælt um plássið.

Hesin møguleikin varð noktaður okkum, tí kappingarnevndin vísti til ein "forskrift" í reglugerðini, henda reglugerðin vísti til ein eykaaðalfund, sum hevði verið í juni 2003. Einast vit finna frá hesum eykaaðalfundi er ein lýsing í Dimmalætting (møguliga eisini í Sosialinum). Tvs tá einki finnist frá hesum fundi, má ein so spyrja var han avlýstur ella hvat? Tá ein hvørki finnur eina samtykt ella veit annað frá eykaaðalfundinum, má so tað sum var galdandi innan henda aðalfundin verða galdandi.

Tá Tjaldur so kom við einum uppskoti á aðalfundinum, um at lækka liðiðini hjá 1. deild kvinnum úr 7 niður í 6 lið, soleiðis at hetta varð tað sama sum hjá monninum. Her var onkur fyri og onnur ímóti uppskotinum, men sum ikki einaferð fór tosið út á eitt síðuspor, Undirritaði skey tá upp, at Tjaldur tók sítt uppskot aftur, treytað av at vit fingu møguleikan til at spæla okkum upp/ella fluttu upp í 1. deild. Hetta var so tann rossahandilin sum varð gjørdur í HSF.

Formaðurin í kappingarnevnduni, segði at hann hevði fingi harraboð frá HSF, um at broyta kappingina tí Tjaldur var komin uppí. Tað er sikkurt rætt, men at tað er grundin til at kappingin bleiv longd ein mána,ð er skeivt. Tað er eingin munur, um tað eru 7 ella 8 lið í kappingin, tí tað liðið sum kemur aftrat, spælir ímóti tí liðinum sum hevði fríviku.

Kappingin bleiv løgd, soleiðis at menn og kvinnur endaði samstundis á páskum. Hetta vóru nøkur feløg ikki so glað fyri, og bleiv tí kalla inn til ein limafund, soleiðis at kappingin bleiv løgd, har øll kundu einast. Úrslitið á hesum fundi var, at kappingin hjá kvinnunum skuldi broytast í januar, soleiðis tað skuldi spælast um FM-heitið í øðrum bólkinum, meðan hin bólkurin skuldi spæla um niðurflyting. Og kappingin hjá monnum og kvinnum endaði 9 Apríl. Hetta var semja um á fundinum.

Ein ella tveir dagar eftir oman fyri samtykt, bleiv aftur kalla inn til limafundar, har tað var eitt limafelag í stóð fyri hesum, og ikki HSF. Á hesum fundi, bleiv samtykt at kvinnurnar spæla til 30. apríl, og menninir vildu undir ongum umstøðum spæla longur enn 26. mars. HSF fer ikki at ganga ímóti einari samtykt har øll limafeløgini eru samd um okkurt, tí mátti HSF bert staðfesta omanfyri nevndu samtykt.

Um vit samanbera okkum við fx. Danmark, so hava tey 14 lið í fremst deild, tey byrja 14. dagar áðrenn vit og gevast nú á páskum, tá hava tey eisini EM/VM og aðrar CUP-dystir at hugsa um, so hví kunnu vit ikki klára st spæla við 8 liðum og enda somu tíð sum í DK.

Við hesum vóni eg at tann negativa skrivingin, um HSF eins og Tjaldur støðgar her.

# Rættleiðing

**Mannbjørn Jákupson**



**Til Kim.**
Í einari av seinastu greinunum hjá Kim Simonsen, stendur millum annað helst rætt og væl kannað, ein stutt viðmerking í viðfarinum. Tað stendur umleið soleiðis, eg havi ikki blaðið her "eins og við Hamsun og F. Nansen vita vit hvar teir endaðu". Kent er at Hamsun, kendi norski nobelvinnarin í bókmentum, var nazistur, nasjunalsosialistur av sannføring og hugmyndafrøði. Tað er ikki aftan fyri ryggin tos, ella útspilling. Hann segði tað sjálvur. Men hann var ikki skipaður nazistur. Luttók í ongum hjá teimum. Fridjof Nansen var ongantíð nazistur, og segði seg ongantíð, at vera tað. Tá illgruni til politiska tilhaldsstað hansara kundi staðist, er tað, at hann, saman við nógvum borgarligu, høgravendum eisini, var við til at skipa eitt kallað "Samfundslaget". Fult av løgum eru í Norra. Eg minnist í 1970 árunum, at norsku nýmarxistarnir í tíðarritum sínum kjakaðu hendan spurning kvalitativt. Teir komu til tí niðurstøðu, at Samfundslaget var ein borgarlig sjálvverja móti kreppuni, men ikki fasistisk, ella nazistisk. Tí er ikki grund til hjá øðrum, at seta iva um demokratiska sinnalagið hjá F. Nansen. Norsk polargranskara tjóðarhetja, høgur embætismaður í Fólkasambandinum í 20 árunum. Hann hevði har, ein annan kendan norðmann undir sær í Ruslandhjálpini, V. Quisling. Tað er har onkur ivi kann hava staðist eisini. Men Quisling var ikki nazistur tá sum heilt ungar.

Eitt svar í blaðnum hevði verið gott.

# Alt ella einki

**Heðin D. Poulsen**



Sum í øðrum føroyskum heimum var fagnaðurin almikil í okkara lítla heimi, tá tey gleðiboð komu okkum fyri oyra, at nú var Framtaksgrunnurin eftir drúgva og holla fyrireiking til reiðar at selja Fiskavirking undir navninum Faroe Seafood. Ein spennandi avbjóðing fyri nevndina hjá Framtaksgrunninum, sum tey tíbetur hava brúkt ríkiligt av tíð og tilfeingi at fyrireika, hesa uttan iva tórgreiddu sølu.

Boðfredurin, sum bar okkum tíðindini um ta komandi navnframu sølu, visti eisini at siga, hvør høvuðssølustrategiin skuldi verað, alt skuldi seljast í einum,- alt gott um tað.

Hetta fekk meg at hugsa um eina søgu, sum ein vinmaður fortaldi mær. Hann hevði í eina tíð ligið framvið at ogna sær tvær automatiskar snellur. Í bløðunum fekk hann eyga á eina lýsing, tað var ein klaksvíkingur, sum seldi átta automatiskar snellur. Vinmaðurin ringir til klaksvíkingin við tí í hyggju, at keypa tvær av hesum átta. Hetta vildi klaksvíkingurin ikki hoyra talan um, hann seldi allar ella ongar. Vinmaður mín, sum er skilamaður og pengamaður afturat, gjørdi bart og keypti allar átta, sjálvt um hann einans hevði brúk fyri tveimum. Tveir dagar seinni, hevði vinmaður mín lýsing í bløðunum, hann hevði til sølu seks automatiskar snellur. Eftir fáum døgum hevði hann selt allar seks snellurnar, til fýra ymiskar keyparar. Munurin millum søluna hjá klaksvíkinginum og søluna hjá vinmanni mínum var, at eindarprísurin á hvørjari einstakari snellu hjá vinmanni mínum gjørdist nógv hægri, tí hann seldi stykkjavís, heldur enn alt ella einki.

Mítt ynski er, at Fiskavirking verður selt fyri hægst møguligan prís og ongantíð ov skjótt, góða sølu.

# Øll eru líka fyri partafelagslógini



**Havi sum prinsipp, at eg ikki svari til dulnevnda skriving og tað ætli eg at halda fast um uttan í undantaksføri sum hesum.**

**Bjørn Patursson**
*formaður Bóndafelag Føroya*
*bjorn@koltur.com*

Hesaferð kundi eg ikki lata pennin liggja, tí dulnevnda lesarabrævið í Dimmu týskvøldið 22. mars sáar beinleiðis ósannindi um bóndur fyri fólk sum ikki hava innlit í partafelagslógina, eins og greinskrivarin tykist at mangla í alstóran mun.

Fyrst av øllum skal eg undirstrika, at tað er munur á at vera bóndi á einum festigarði í mun til at vera bóndi á einum garði sum er ogn, sjálvt um teir annars eru eins í øllum øðrum lutum. Ein av hesum munum (missmunum) hevur higartil verið, at bóndin sum situr við festigarðinum hevur verið avskorðin frá, at reka virksemi sítt í partafelagi í mun til tann sum situr við sama garði sum ogn. Ymist er, um tað er fyrimunur ella vansi við partafelagið, men síðan skipanin um íløgugrunn var avtikin og partafelagsskatturin settur niður til 20% hevur rakstur í partafelagsformi verið einast møguleiki hjá vinnurekandi við fyrimuni, at leggja pening til viks til íløgur í vinnutól.

Bóndafelag Føroya vísti á hendan mannamun tá skipanin um íløgugrunn bleiv niðurløgd og hevur javnan síðan, í skrivt og talu, víst á hendan skeivleika í festiskipanini. Og nú lógarbroytingar blivu gjørdar í lóg um landsjørð tóku vit millum annað hendan spurningin uppaftur og sjálvt um tað aftur hesaferð møtti masivari mótstøðu m.a. frá politikarum í vinnunevnd løgtingsins sum vildu leggja høvdi á blokkin fyri, at tað ikki kundi lata seg gera, at skipa lóg um landsjørð soleiðis at festibóndur kunnu leggja garðsraksturin i partafelagsform fekk Bóndafelagið, við góðum stuðuli frá landsstýrismanninum í vinnumálum, harra Bjarna Djurholm, eina grein inn í omanfyri standandi lóg, at festibóndur skulu kunnu leggja raksturin av einum festigarði í partafelagsform eins og onnur vinnurekandi, tað er alt sum málið snýr seg um, harra undrandi, at festibóndur komu eitt stig rætta vegin!

Eg eri væl vitandi um at enn eru mong stig eftir til tess at festiskipanin kemur at virka frítt, ájavnt við onnur í líknandi vinnu, men sum sami landsstýrismaður harra Bjarni Djurholm segði tá níggja skipanin kom í gildi, tað er hóast alt betri at koma eitt stig framá enn at standa i stað, tí at standa í stað er í sær sjálvu afturgongd.

Í greinini kemur hesin sami undrandi persónurin við ymiskum púra óskiljandi uppáhaldum um, at bóndur kunnu heva pening burtur úr partafelag uttan at rinda skatt, avskriva skuld í gjøgnum eitt partafelag? Hetta er so langt av leið at eg ikki vil brúka tíð uppá at viðgera tað.

Skal tó geva honum rætt í, at eitt partafelag sjálvandi, um eigarin ynskir tað, kann rinda rentu og avdrátt av lánum eisini sjálvt um tað skuldi verið fyri eitt festilán. Sum um nakað skuldi verið galið í tí? Tá talan er um festilán sigur skattalógin, at renta og avdráttur er at rokna sum leiguútreiðsla so fingu vit eisini tað uppá pláss.

---

*Framhald av síðu 11*

Tað er t.d. ikki nóg gott, at sagt verður, at boð koma tá viðkomandi er komin aftur úr feriu. At tað skulu minst tveir røntgenlæknar og tveir patologar sum hvør í sínum lagi skulu meta um hvørja mammografi og hvønn biopsi og annan vevnað, setir eisini serstøk krøv til hesar deildir. Ein serstøk skipan skal eisini verða til at innkalla kvinnur.

Royndir vísa, at um luttøkan fellur undir 70% er yvasamt við nyttuni, sjálvt í eini annars sera vælfungerandi skipan. Og endiliga skal ein neyv uppgerð gerast um nyttuna av atgerðunum. Eisini hesin parturin verður eitt sindur trupul at gjørnumføra í Føroyum, av tí at materialið er so mikið lítið, so tað kann taka langa tíð at vita, um nøkur nytta er í mammografi screening í Føroyum ella ikki. Vit mugu ikki gloyma, at tað eru fleiri lond, sum ikki hava sæð nakra nyttu í screeningini.

Og so er altíð spurningurin um peningurin kundið verið betri givin til átøk móti royking, alkohol ella øðrum sjúkum og brekum.